# Jólaklassikari í nýggjari innspæling



Ein av heilt kendu jólasangunum frá nýggjari tíð er Last Christmas, sum enski poppbólkurin Wham! Spældi og sang. Sangurin plagar at verða tráðspældur her í Føroyum undan jólum, og tað hevur hann verið mest sum á hvørjum ári síðani 1984, tá ið sangurin varð givin út.

Nú eru teir báðir sangararnir í Wham á veg við einari nýggjari útgávu av sanginum. George Michael, sum er tann kendari av teimum, hevur tikið samstarvið uppaftur við Andrew Ridgeley, og teir hava spælt sangin inn av nýggjum.

Sangurin verður ikki givin út á fløgu. Hann kann bara downloadast umvegis internetið, og útgávudagurin er settur at vera tann 16. desember.

Áhaldandi søgur hava gingið um, at Wham! skal fara at spæla aftur, men hesar søgur hevur George Michael, sum í nógv ár hevur verið nógv frammi sum solistur, avsannað. Søgurnar hava verið so neyvar, at tað skuldi eitast fyri, at teir fóru av avdúkað hetta tann 17. desember. Tíðin fer so at vísa, um søgurnar eru sannar ella bara slatur.

























